Skurring í føroyskum

Skiftið frá framtungu-r til baktungu-R og møguligt samband við skurring í føroyskum.

Tórður Jóansson

Ymsastaðni í Føroyum vóru einstøk fólk, ið »skurraðu« ella »skarraðu«, tá ið tey bóru fram ljóðið *r*.[1]) Fyribrigdið var vanligt í ávísum býlingum, ættum og húsum í Kaldbak, í Kollafirði (Oyrareingjum), í Koltri, í Oyndarfirði, í Elduvík og á Nesi í Suðuroy.[2]) Ikki hevur eydnast at fáa uppspurt, hvørt hesin sermerkti r-framburður hevur verið nýttur aðrastaðni í landinum. Og lítið og einki er at finna í bókmentum um skurring í Føroyum; men tó er komið fram á ein høvund, ið nevnir fyribrigdið (Mitens 1964: 26). Hann tekur soleiðis til: »Klæmint Høgnesen í Oyndarfirði kom at vitja meg. Eg minnist hann sum gamlan, lítlan mann. Hann var fryntligur og skurraði eitt sindur á málinum.« — Hetta var, meðan høvundurin starvaðist í Fuglafirði í 1913.

Skurrað *r* er eitt serligt allofon av foneminum /r/, sum annars hevur fleiri allofon (Sweet 1906, Fisher-Jørgensen 1962, Abercrombie 1964, Malmberg 1969, Trudgill 1974, Bøðvarsson 1975, Simpson 1979). Vanliga verður talað um tvey høvuðssløg av r-ljóðum: framtungu-r og baktungu-R. Hitt fyrra kemur í við at tungubroddurin ger forðing beint aftan fyri framtenninar ella á rygginum millum framtenn og góma, og hetta *r* verður t.d. nýtt í føroyskum. Hitt seinna kemur í við at tungurótin ger forðing aftantil í gómanum ella móti úlvinum, og hetta *R* verður t.d. nýtt í donskum.[3])

Hesi bæði høvuðssløg av /r/, framborin annaðhvørt framman- ella aftantil í munninum, kunnu so gerast á ymsan hátt. Ein ljóðfrøðingur (Fisher-Jørgensen 1962: 73ff) skilir ímillum seks r-ljóð: 3 framtungu-r, rullað, flappað og órullað, 1 retroflekst flappað r og 2 baktungu-R, rullað og órullað; og tað er rullaða baktungu-R-ið, sum vit siga »skurrar«, ella »skarrar«. Aðrir ljóðfrøðingar (Principles 1978: 10ff) skilja ímillum tíggju sløg av /r/-um, og hendan sundurbýting er neyvari og óivað nýtiligari, skal fevnast um ljóðini í flestum av heimsins málum.

Men á sama máli verður *r* ikki altíð framborið á sama hátt. Tað veldst millum annað um, hvar í orði r-ljóðið er, ella í hvørjum ljóðsambandi tað stendur. Síðst í orði verður r-ið stundum als ikki framborið; á summum bygdamálum verður r-ljóðið framborið skilligari og við meira herðing enn á øðrum; ofta er r-ljóðið ikki rættiligt hjáljóð, men heldur eitt hálvsjálvljóð (»semivowel« ella »continuant«); og stundum verður rullað ella surrað á r-inum.[4]) Hesi fyribrigdi eru ikki óvanlig í

økjum, har sama mál og sami framburður annars verða nýtt.

Eisini er kunnugt, at ljóðini broytast, sum tíðin líður. Framburðurin av ymsu ljóðunum er ikki hin sami í dag, sum hann var fyri nøkrum øldum síðani. Og her er r-ljóðið einki undantak. Mangt bendir á, at í øllum europiskum málum varð *r* framborið sum framtungu-r í hvussu so er til móti endanum av 16. øld (Trudgill 1979: 160ff, 1983: 56-59). Og hildið verður, at hetta var eitt rullað ella flappað r-ljóð, soleiðis sum tað enn verður framborið í ávísum sløgum av skotsk-enskum og italskum.

Men einaferð, kanska í 17. øld ella umleið 1700, tók ein nýggjur r-framburður seg upp, og R-ljóðið varð gjørt aftantil í munninum við forðing millum tungurót og úlv ella aftasta partin av bleyta gómanum. Summi halda, at hetta nýggja *R* byrjaði sum móti í yvirstættini í París og síðani breiddi seg til onnur lond og mál í Europa. Og í dag er baktungu-R vanligi framburðurin á fronskum, týskum og donskum og lutvíst á hollendskum, norskum og svenskum. Hetta baktungu-R hevði tveir framburðir: rullaðan og órullaðan. Rullaði framburðurin — skurrað R — hoyrist framvegis, men hin órullaði er nógv vanligari.[5])

Ikki er heilt greitt, nær hetta nýggja *R* kom til Norðurlond, men einstakir málfrøðingar hava viðgjørt spurningin. Líkt er til, at í flestum bygdamálum í Danmørk og í Suðursvøríki var framtungu-r framvegis ráðandi fyrstu tíggjuárini í 1800-talinum (Nielsen 1951: 58), men umleið 1830-50 verður baktungu-R vanligt ymsastaðni í Hallandi, á Sælandi, Bornholm, á Lálandi og eystara partinum á Fjóni, meðan tað helst er eldri á Møn, Falstri, Langalandi og Vesturfjóni. Og hildið verður, at t.d. á Ærø og í pørtum av Jútlandi hendi skiftið ikki fyrr enn móti endanum av 19. øld (Sjöstedt 1936).

Tvørligt er at fáa vissu fyri, nær skiftið frá framtungu-r til baktungu-R fór fram, tí ljóðupptøkutól vóru eingi, og heimildirnar eru yvirhøvur munnligar frásagnir frá eldri fólki. Men tó ber til at finna onkrar samtíðarhøvundar, ið greiða frá r/R-framburðinum (Dahl 1823, Rask 1826, Birch 1833, Jespersen 1897), og alt tykist benda á, at í Norðurlondum byrjaði skiftið um aldamótið 1800 og fyrstu tíggjuárini aftaná.[6])

At skurra verður eisini meira beinleiðis umrøtt hjá onkrum høvundum í 19. øld. Ein teirra (Sander 1808: 25) nevnir eitt hart og langt rullandi *R* afturí barkanum, og somuleiðis nevna aðrir danskir og norskir (Larsen 1922: 4, 62f) málfrøðingar eitt *R*, sum óivað er tað ljóðið, vit kalla at skurra ella skarra.[7])

Men hvussu, hvaðan og nær kom so hesin R-framburður til Føroya? Og var hetta byrjanin til eitt r>R skifti, sum ongantíð festi rót her á landi? — Her mugu vit snúgva okkum til søgu og ættargransking, tí ongar haldgóðar skrivaðar heimildir eru enn funnar hesum viðvíkjandi.[8])

Føroyar hava neyvan nakrantíð verið so avbyrgdar, sum vanliga hevur verið hildið, og serliga frá seinnu helvt 18. aldar er sambandið økt munandi (Joensen 1980: 211ff). Eisini vóru fleiri útlendingar, ið búsettust í Føroyum, mest danir, men eisini norðmenn, bretar og týskarar. Og at ein munandi innflyting av fremmandum fólki hevur ávirkað siðvenju, mál og framburð, eru mong dømi um. Men torført er at siga nakað ítøkiligt um hesi viðurskifti, tí enn er so ómetaliga lítið gjørt til at fáa greiði á spurninginum.

Allarflestu prestarnir aftan á trúbótina komu úr Danmørk, og eftirkomarar teirra komu ofta væl fyri í føroyska samfelagnum.

Og í tí tíðarskeiði, tá ið baktungu-R rættiliga rein við í Danmørk og so við og við vann á framtungu-r, vóru fólk úr ávísum donskum, norskum og týskum ættum, ið búsettust í Føroyum (Debes 1977: 31-37, 55-63). Her verður til dømis sipað til Djurhuusættina, ið kom úr Jútlandi og Sælandi um 1740, Rønningættina úr Vesturnoregi um 1770 og Reinertættina úr Týsklandi um 1800. Og hesi fólk ferðaðust, sum vera man, dúgliga til skyldfólkini á meginlandinum, har tey stundum dvaldust leingi. Eitt teirra var ein genta, ið hevði tænt í Keypmannahavn, m.a. hjá franska sendiharranum har, í sjey ár, tá ið hon í 1785 kom heim aftur og giftist við bóndanum á Oyrareingjum. Og tey orð, ið hendan kona skal hava sagt, og sum livdu á fólkamunni, tá ið H. M. Debes (f. 1888) festi tey á blað, vóru á donskum.

Ein onnur genta av Djurhuusættini giftist í 1805 við einum týskara (Degn 1945), sum var og ferðaðist hjá skyldfólki í Føroyum. Við Á í Kaldbak var tá ein 12 marka garður, sum ongan festara hevði, og dømt varð, at garðurin skuldi verða býttur í tveir seksmarkagarðar, og at nevndu hjún skuldu hava annan. *H. M. Debes* (bls. 61) tekur skemtiliga soleiðis til: »Hábærsligt hevði altíð verið í Kaldbak; men nú bar av, nú fór alt at tosa hálvdanskt.« — Kann hetta vera ein ábending um, at einstøk fólk í Kaldbak skurraðu?

Skurringin úti í Koltri kom helst úr Kaldbak, hagar ein havnargenta giftist um 1820. Maðurin gekk burtur, men hon átti son, ið giftist út í Koltur, og tað vóru júst fólk í hesi ætt, ið skurraðu. Tey búðu í næstnorðasta húsinum, Uttar í Stovu, seinni bátasmiðja hjá Niclasi í Koltri.[9])

Enn er lítið vitað um skurringina í Oyndarfirði. Men har var hesin r-framburður hildin at vera »móti« og »fínt«. Við hvørt søgdu oyndfirðingar eisini *g* í staðin fyri *r*. Ein heimildarmaður sigur, at tey skurraðu bæði í Eldu-vík og í Oyndarfirði til onkuntíð í 1920-árunum, og at tá hevði hetta verið gjørt í umleið 100 ár.[10])

Á Nesi í Suðuroy skurraðu tey eisini. Hagar kom maður av Djurhuusættini í 1820-árunum, og ein tann seinasti, ið skurraði í Suðuroy, var Mortan Djurhuus við Hvanndalsá, í Vági, ættaður av Nesi (1852-1938). Somuleiðis vóru fólk í Porkeri og í Vági, sum skurraðu. Dømi eru um, at summi teirra royndu at sleppa undan at nýta orð, sum byrjaðu við *r*. Tey søgdu t.d. »kýsakona« í staðin fyri »frúgv« í talvi og »tað er vátt« í staðin fyri »tað regnar«.[11])

Líkt er til, at skurringin í Føroyum er komin uttanífrá, helst úr Danmørk, um ta tíðina, tá ið skiftið frá framtungu-r til baktungu-R fór fram har, t.e. umleið 1800, og at hesin framburður hevur hildið sær ymsastaðni í landinum til umleið 1920-30. Men eingin ivi er um, at kanningar viðvíkjandi fólkaflyting og ættum kunnu geva eina gjølligari mynd av fyribrigdinum. Men evnið hevur higar til ikki verið serliga væl lýst ella viðgjørt — hvørki í Norðurlondum ella í Føroyum. Og heldur ikki er heilt greitt, hví, hvussu, hvar og nær baktungu-R tók seg upp, og hvussu tað breiddi seg í Europa.

Vónandi verður høvi til at koma aftur til hetta áhugaverda evnið seinni, og heitt verður á fólk, ið vita eitthvørt at siga frá skurring í Føroyum, at venda sær til høvundin.

Viðmerkingar

1) Her verður ikki hugsað um møguligt talubrek.
2) Fyrsta, undirritaði hoyrdi um »skurring«, var frá móður míni, Louisu Mohr, sálu, Fødd Vang í Kaldbak í 1911. Men tað var Dr. J. M. Y. Simpson, lærari mín í ljóðfrøði á Glasgow University,

ið gjørdi vart við, at skurring var ikki óvanligt fyribrigdi aðrastaðni. Chr. Matras, dr. phil., og Ulf Zachariasen, mag. art., hava eisini givið góðar upplýsingar.

3) Salomon J. Joensen prestur hevur sagt mær, at hann minnist, at í Suðurjútlandi søgdu tey eitt rullandi framtungu-r.
4) *r* kann eisini verða framborið sum *g* ella *j* (at »blessa«).
5) Munur er eisini á, hvussu fólk úr ymsum stættum siga *r* í hesum londum. Og stundum verður rullað *r* nýtt á leikpalli.
6) Reidar Djupedal Professari í Tróndheimi hevur vístá týðandi heimildir í brævi til mín, eins og Peter Trudgill professari í Reading og Arne Kjell Foldvik í Tróndheimi.
7) Summi hildu lítið um hetta nýggja R-ljóð.
8) Her hevur John Davidsen ættargranskari útvegað virðismiklar upplýsingar.
9) Heimildarfólk: John Davidsen og Niclas í Koltri.
10) Heimildarfólk: Jóhanna Danielsen (f. Petersen) lærarinna í Havn, ættað úr Oyndarfirði, og Jógvan Høgnesen bóndi í Oyndarfirði.
11) Heimildarmaður: Eivind Weyhe, mag. art., úr Vági, sum eisini gjørdi so væl at lesa handritið til hesa grein, áðrenn tað varð reinskrivað.

Bókmentir

1. Abercrombie, D., *Elements of General Phonetics*, Edinburg 1977: 44.
2. Bøðvarsson, Á., *Hljóðfræði*, Reykjavík 1975: 75.
3. Dahl, F. P. J., *Oversigt af den danske Retskrivningslære*, København 1823: 9 (tikið úr (12.)).
4. Debes, H. M., *Søgur úr gomlum døgum*, Tórshavn 1977: 31-37, 55-63.
5. Degn, A., *Færøske kongsbønder*, Tórshavn 1945.
6. Fisher-Jørgensen, E., *Almen fonetik*, København 1962: 33ff.
7. Jespersen, O., *Fonetik*, København 1897: 427 (úr (12.)).
8. Joensen, H. D.: »Sambandið føroyinga og útlendinga millum,« *Fróðskaparrit*, 28-29, Tórshavn 1980: 211-245.
9. Larsen, A. B., *Sognemålene*, Kristiania 1922: 4, 62ff.
10. Malmberg, B., *Lärobok i Fonetik*, Lund 1969: 107-112.
11. Mitens, E., *Eg minnist*, Tórshavn 1864: 26.
12. Nielsen, N. Å.: »Om bagtunge-r'ets opkomst i dansk«, *Sprog og Kultur*, XVIII, 1951: 58-64.
13. Pride, J. B. og J. Holmes, *Sociolinguistics*, Harmondsworth 1972: 192f.
14. *Principles of the International Phonetic Association, The*, London 1978: 10ff.
15. Sander, L. C., *Odeum: eller Declamerekunstens Theorie*, København 1808: 25 (úr (12.)).
16. Simpson, J. M. Y., *A First Course in Linguistics*, Edinburgh 1979: 51-53.
17. Sjöstedt, G., *Studier över r-ljuden i sydskandinaviska mål*, Lund 1936 (úr (12.)).
18. Sweet, H., *A Primer of Phonetics*, Oxford 1906: 84.
19. Trudgill, P., *Sociolinguistics*, Harmondsworth 1979: 160ff.
20. Trudgill, P., *On dialect*, Oxford 1983: 56-59.

Summary

In Faroese /r/ is normally an alveolar fricative or continuant, but in some villages it was a (voiced) uvular roll with certain families until the 1920s. The back pronunciation of /r/ seems to be comparatively new in Europe and is thought to have started in Paris in the 17th century. It probably reached Scandinavia around 1800.

In the second half of the 18th century a few foreigners settled in the Faroes, and it is likely that the back-R was brought into Faroese by them. Genealogical and historical researches seem to indicate that the uvular roll started in one village around 1800 and then spread with members of certain families.

Perhaps this special /r/-pronunciation could be regarded as an r > R shift that did not prevail in the islands.